# Stór trímenninga- og fermenningaveitsla



*Í sambandi við, at tað eru 200 ár síðani Mohr-ættin kom á Hoyvíksgarð, verður skipað fyri stórari ættarstevnu í august mánaða*

**Eftirkomararnir hjá Mouritz og Marin Mohr fara í næstum at skipa fyri eini stórari ættarstevnu. Talan eru um eini 6-700 familjulimir, ið kunnu koma, men fyrireikararnir vænta ”bert” 2-300 trímenningar og fermingar**

ÆTTARSTEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

Tann 5. november í ár eru 200 ár liðin síðani Mohr-ættin kom á Hoyvíksgarð, og er tað í hesum sambandi, at eftirkomararnir hjá Mouritz og Marin Mohr hava valt at skipa fyri eini stórari ættarstevnu.

Sjálvt um Mouritz Mohr andaðist, bert 37 ára gamal, fingu hann og Marin 11 børn. Tey ellivu børnini, Peter, Daniel Pauli, Elisabeth Mariane, Sára, Mourits, Hans Martin, Elieser, Henrikke Sofia, Johan Vilhelm, Jens og Mourentsa Martina fingu tilsamans 51 børn.

– Ætlanin er at fara á grøvina hjá Mouritz Mohr, sum liggur grivin í Havnar kirkju, og síðani til kirkjugarðin á Svínaryggi, har konan, Marin liggur grivin, og tað gera tey flestu børnini hjá teimum eisini, og har ætla vit eisini at leggja krans á, sigur Petur Even Djurhuus, sum er ein av stigtakarunum og samskipari.

### 700 familjulimir

Spurdu um, hvussu nógv fólk talan er um, sigur Petur Even, at hann hevði talt leystliga eftir, og hann var komin upp í eitt tal millum 600 og 700, men hann væntar ikki, at so nógv fara at koma til ættarstevnuna. Eini 2-300 er eitt meira veruligt tal, heldur hann.

– Zacharis Vang skal halda ein fyrilestur um Nikolai Mohr, og síðani verður ein samkoma á Hoyvíksgarði og um kvøldið verður ein stór veitsla, greiðir Petur Even frá.

– Ofta hevur verið tosað um at skipa fyri onkrum tílíkum, men tað er ongantíð komið so langt, men fyri stuttum, so kom eg fram á, at tað eru 200 ár síðani, at Mohr ættin kom á Hoyvíksgarð, og tí helt eg, at hetta var eitt upplagt høvi at savnast. Eg tosaði síðani við ymisk onnur fólk, og tað vísti seg, at stórur áhugi var fyri at skipa fyri eini ættarstevnu.

Ættarstevnan verður í Havn og í Hoyvík leygardagin tann 17. august. Seinasta freist er at tekna seg er tann 26. juli.

# Føroyskur savnsleiðari í Nyborg

**Kirsten Eliasen tekur tann 1. august alment við starvinum, sum savnsleiðari á Nyborg og Omegns Museer í Danmark. Hon fekk starvið út av 20 umsøkjarum**

STARVSSETAN
*Ingrid Bjarnastein*

Kirsten Eliasen er fødd og uppvaskin í Fuglafirði. Í 1994 tók hon prógv í Århus, sum miðaldarfornfrøðingur. Hon hevur síðani hon var útbúgvin verið í ymiskum leysum størvum, so hetta er fyrsta fasta starvið Kirsten hevur síðani hon fekk útbúgvingina fyri átta árum síðani.

– Tað eru ikki so nógv føst størv innan museumsverðina í Danmark, og tá tey so søktu eftir einum leiðara, valdi eg at søkja. Eg havi havt nógv leys størv síðani eg byrjaði, verið við í projektum, so at fáa eitt fast starv verður avgjørt ein stór avbjóðing, sigur 46 ára gamla Kirsten Eliasen.

Kirsten hevur eisini arbeitt í Føroyum. Hon hevur verið landskjalavørur á Landskjalasavninum og í fjør vikareraði hon fyri landsantikvariatin á Fornminnissavninum.

– Eg havi arbeitt nógv í Føroyum bæði undir og aftaná lestrartíðina. Tá fekst eg við fornfrøðisligar grevstir, fortelur Kirsten Eliasen.

Sum leiðari kemur Kirsten millum annað at hava ábyrgdina av tí fakliga og tí fíggjarliga partinum av fornminnissavninum. Afturat sær kemur hon at hava fyrrverandi leiðaran, Knud Hornbeck, sum skal arbeiða á savninum hálva tíð, og harafturat skal ein fornfrøðingur setast í starv. Áðrenn var Knud Hornbeck einsamallur á tí fakliga økinum, so nú er starvið vorðið eitt sindur størri enn áðrenn, og metir Kirsten hetta vera eina stóra avbjóðing.

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu,
tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi
og langabbi okkara

**Petur Bjarnastein**

doyði og varð jarðaður.
Ein serlig heilsan og tøkk til Fuglafjarðar Sangkór
og Vesturstovu.

**Magda og synirnir við familju**

# Útoyggjafelagið havt aðalfund

TÍÐINDASKRIV
*Nevndin í Útoyggjafelagnum*

Á útoyggjastevuni í Skúvoy, leygardagin 13. juli, helt Útoyggjafelagið sín fyrsta regluliga aðalfund. Hóast tað er sera trupult at ferðast útoyggjanma millum, eydnaðist tað við góðari hjálp frá Atlantic Airways, Vaktar & Bjargingartænastuni og Strandfaraskip Landsins at fáa øll, ið skuldu luttaka á aðalfundinum og útoyggjastevnuni, út til Skúvoyar og heimaftur í øllum góðum.

Á aðalfundinum skipaði umboðsráði seg við Harry Jensen, Skúvoy sum form., Signhild Joensen, Trøllanes, næstform. og Óla á Geilini, Svínoy sum skrivara.

Í starvsnevndina vóru vald: Óla Jákup úr Dímun, form., Esbern í Eyðanstovu og Olga Biskopstø, tiltaksnevndarlimir eru: Jógvan Edmund í Geilini og Laura í Frammistovu.

Fundurin viðgjørdi eisini umstøðurnar at búleikast á útoyggj. Semja var um at naka av tí fyrsta starvsnevndin skal arbeiða fyri er betri samferðslu og samskiftismøguleikar og ei ni loysn á oljuveitingini til tær útoyggjar, sum í dag fáa oljuna í oljutunnum.

Sum nevnt var Útoyggjastevna henda dagin. Tað vóru skúvoyingar í tóku stig til og fyrireikaðu stevnuna. Ágóðin av stevnuni fer til at byggja eitt bygdarhús í Skúvoy. Stevnan var sera væl fyriskipa og væleydna í allar mátar, ikki minst takka verið tí gestablíðni í var sýnt teimum mongu hundrað fólkunum íð luttóku á stevnuni, harav nógv vóru av útoyggjunum.

Nevndin í ùtoyggjafelagnum ynskir at takka øllum, íð gjørdu sítt til at tiltakið bleiv so væleydna.



# Roykvarnarar skuldu verið krav

**Spurningurin um roykvarnarar hevur aftur tikið seg upp eftir syndarligu deyðsvanlukkuna í Havn sunnunáttina. Brandmeistarin heldur, at tryggingarfeløgini skuldu givið fólki varnarar, tí tað hevði bjargað mannalívum og spart teimum nógvan pening**

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*

Roykvarnarar kunnu bjarga mannalívi. Teir kunnu eisini spara tryggingarfeløgum nógvan pening. Tí eiga øll at hava áhuga í at hava roykvarnarar í sínum húsum. Hetta heldur leiðarin hjá sløkkiliðnum í Havn, Kartni Jacobsen.

Húsini á Gripsvegnum, sum brendu sunnunáttina, høvdu eftir øllum at døma ongar roykvarnarar, sum boða frá, tá ov nógvur roykur eru í húsunum.

– Eg haldi, at tryggingarfeløgini skuldu kravt av sínum viðskiftafólki, at tey hava roykvarnarar í húsunum, tá tey skriva undir tryggingarskjølini. Antin skuldu fólk fingið teir í hondina, ella kundu feløgini sent menn út at seta teir upp, tí fólk hugsa ofta ikki um slík viðurskifti, sigur Kartni Jacobsen.

Petur á Lava Olsen á Brunaumsjón Landsins er samdur við brandmeistaranum, og hann heldur, at vit áttu at farið undir eitt átak, har fólk vórðu mint á tað alneyðuga í at hava roykvarnarar.

Spurningurin er, um hetta ikki áttið at verið lógarkrav. Kartni Jacobsen vísir tó á, at hetta hevði kravt av myndugleikunum, at teir høvdu eftirlit við, um fólk í veruleikanum hava roykvarnarar.

– Eg rokni við, at tryggingarfeløgini høvdu spart nógvan pengin, um tey høvdu kravt av tryggingartakaranum, at hann hevði roykvarnarar í húsunum. Tí hevði eitt slíkt tiltak eisini tænt teirra áhugamálum, sigur Kartni Jacobsen.

### Tekur undir

Mortan Poulsen, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, sigur, tey altíð mæla fólki til at hava roykvarnarar í sínum heimum, tí hetta kann bjarga mannalívum. Tað kann samstundis spara teimum pening, um fólk varnast eldsbrunar fyrr.

– Vit havaætlanir um at hava roykvarnarar tøkar, sum vit kunnu geva viðskiftafólki, ið støkka inn á gólvið, sigur Mortan Poulsen. Tað er síðani ábyrgdin hjá fólki at fara heim og seta varnaran upp.

Tryggingarfelagið Føroyar hevur harumframt á hvørjum ári eina lýsing í fjølmiðlum, har heitt verður á fólk um at skifta battaríini í roykvarnarunum.

Vinnukundar hjá felagnum verða tó kannaðir á hvørjum ári, um teir hava hesi viðurskiftini í lagi. Hetta er tó ikki galdandi fyri húsarhald.



*Leiðarin hjá sløkkiliðnum í Havn, Kartni Jacobsen, heldur, at tryggingarfeløg skuldu givið øllum sínum viðskiftafólki roykvarnarar, sum boða frá ov nógvum royki*

*MYND: Eirikur Lindenskov*

# Fólkatónleikur á Gøtusandi

**Konsert verður á Gøtusandi fríggjakvøldið við áhugaverdari skrá. Clickhaze og Hanus G. Johansen eru tvey av nøvnunum á konsertini**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

*G! Festivalurin hevur nú fingið búmerki, og fyriskipararnir hava stórar ætlanir við honum. Fríggjakvøldið verður festivalurin á Gøtusandi*

Fríggjakvøldið 19. juli verður tónleikafestivalur á sandinum í Syðrugøtu. Konsertin byrjar klokkan 19, og tað eru Tónleikasamtakið Grót og Fólkatónleikarstevnan, sum í felag skipa fyri G! Festivalinum, sum hann verður nevndur. Tað sæst eisini aftur á teimum luttakandi bólkum og einstaklingum.

Luttakararnir á konsertini eru Clickhaze, MC-Hár, Enekk, Hanus G. Johansen, Søren Søgaard og Valeri & Desislava Dimchevi úr Bulgaria. Talan er um nøkur av teimum fremstu føroysku nøvnunum innan bæði rokk- og fólkatónleik.

Grót hevur nú í trý ár á rað skipað fyri útikonsert á Gøtustevnu, men hetta er fyrstu ferð, at konsertin verður hildin á sandinum. Og Grót hevur stórar ætlanir fyri festivalin. Ætlanin er at hava ein veruligan tónleikafestival, sum framyvir eisini skal hýsa útlendskum bólkum. Festivalurin hevur fingið navn og búmerki, og hann skal mennast komandi árini.

Gøtustevnan er eisini komandi fríggjakvøld, og onnur spennandi tiltøk eru eisini á skránni. Tey, ið hava hug at fara upp á gólv aftaná festivalin, kunnu fara yvir í losjuna við Gøtugjógv, har Grót skipar fyri kafé og føroyskum dansi.

Bussur koyrir úr Havn og aftur í sambandi við festivalin, og lýst verður nærri um ferðaætlanina.

Sólarn Solmunde er talsmaður fyri festivalin, og hann væntar nógv fólk, um veðrið verður til vildar. Atgongumerki kosta 100 krónur og kunnu keypast við inngongdina, meðan limir í Grót sleppa inn fyri 80 krónur.

# Bygningar við celloteks-plátum eru vandamiklir

**Petur á Lava Olsen á Brunaumsjón Landsins sigur, at allir bygningar við celloteks-plátum hava eina sera vánaliga brunatrygd. Og tað eru fleiri túsund hús og bygningar í Føroyum, sum eru klødd við hesum plátunum innan**

CELLOTEKS
*Stefan í Skorini*

Celloteks-plátur hava verið nógv nýttar seinastu fimmti árini, og tí eru fleiri hús í Føroyum, sum eru klødd við slíkum plátum innan. Forboð varð sett ímóti at nýta slíkar plátur í 1992.

– Ein bygningur við celloteks-plátum er ógvuliga vánaligur, tá talan er um persónstryggleika, tí eldurin mennist so ómetaliga skjótt. Sløkkiliðsmenn skulu vera skjótir á staðnum fyri at basa eldinum, sigur Petur á Lava Olsen, sum hevur drúgvar royndir við hesum slagnum av plátum.

Ein bygningur ella eitt hús við celloteks-plátum er tí sera vandamikil, og tryggleikin er munandi verri enn í øðrum húsum við nýggjari klædningi innan.

– Persónliga trygdin er vánalig, tí fólk sleppa ikki burtur, og tey verða doyvd av roykinum, sigur Petur á Lava Olsen.

### Hurðar staðið opnar

Kartni Jacobsen, leiðari hjá sløkkiliðnum, sigur, at eldurin mennir seg fleiri ferðir skjótari við celloteks-plátum. Hann væntar, at fleiri av hurðunum stóðu opnar, so at eldurin nørdist av luftini.

– Tað gongur so skjótt fyri seg, at tú verður yvirraskaður hvørja ferð. Um fólk ikki varnast eldin beinanvegin, so er tað longu ov seint, sigur Kartni, sum metir, at vandin er nógv størri við slíkum celloteks-plátum.

### Kanningar ikki lidnar

Kanningarnar hjá løgregluni eru enn ikki lidnar. Serfrøðingar eru komnir úr Danmark at kanna orsøkina til eldin, og teir eru enn ikki komnir til nakra niðurstøðu.

Nevnast skal, at pápin at dreingjunum gjørdi alt fyri at sleppa innaftur í húsini at bjarga dreingjunum, men hetta eydnaðist ikki, tí eldurin var longu ov umfatandi.